# FRÁGREIÐING UM

# SAMTÍÐARSKATTASKIPANINA

apríl 1988

Líkningarráð Føroya og P/f Elektron

A. INNGANGUR v/Jóngerð Purkhús.

B. ENDAMÁL VIÐ FRÁGREIÐINGINI v/P.A.Lamhauge.

1. Nær verður samtíðarskattaskipanin liðug?
2. Bygnaðurin av skattaumsitingini.

C. SKATTAUMSITINGIN v/ Kurt Madsen

1. Tann nýggja lógin.
2. Fyribils- og endalig álíkning.
3. Samskifti
4. Edv - fyrimunir og vansar.

D. EDV-SKIPANIN v/Elin í Jákupsstovu

1. Arbeiðið higartil
2. Samtíðarskatturin í dag
3. Planlegging og rakstur
4. Arbeiðið framyvir.

E. UM ELEKTRON v/Bjarna Wilhelm

F. FYLGISKJØL

## B.1.: NÆR VERÐUR SAMTÍÐARSKATTASKIPAN LIÐUG?

?

Hesin spurningur verður ofta settur bæði Líkningarráðnum og Elektron.

Innkrevjingin eftir samtíðarskattaprincippinum fór í gongd 1. apríl 1984, og vanliga fatanin er tí, at arbeiðið hesum viðvíkjandi átti at verið liðugt fyri langari tíð síðani.

Endamálið við hesi frágreiðing er at royna at svara hesum spurningingi, og samstundis geva eitt heildaryvirlit yvir skipanina, sum hon sær út í dag.

## B.2.: BYGNAÐURIN AV SKATTAUMSITINGINI

Niðanfyri verður í høvuðsheitum víst, hvussu skattaumsitingin er uppbygd í dag og hvørjar høvuðsuppgávurnar eru hjá líkningarvaldinum.
Normeringsskipanin verður víst í høvuðstølum, eins og ein samanbering verður gjørd við donsku skattaumsitingina.

### FØROYSKA SKATTAUMSITINGIN




NORMERAÐI STØRV Í SKATTAUMSITINGINI

*FØROYAR*
*(46.312 ÍBÚGVAR)*

| | STØRV: | ÍBÚGV.PR. STARV: |
|---|---|---|
| HØVUÐSSKRIVSTOVA RÁÐSINS | 32 | 1.447 |
| DEILDARSKRIVST. *ÍROKNAÐ TN* | 48.5 | .954 |
| | ----- | ----- |
| STØRV ÍALT | 81.5 | .568 |
| | === | === |

*DANMARK*
*(5.000.000 ÍBÚGVAR)*

| | | |
|---|---|---|
| SKATTEDEPARTEMENTET | .170 | |
| STATSSKATTADIREKTORATET | 1.000 | |
| AMTSSKATTEINSPEKTORATET | 1.000 | |
| | ----- | |
| | 2.170 | 2.304 |
| KOMMUNUUMSITING | 7.500 | .667 |
| | ----- | ----- |
| STØRV ÍALT | 9.670 | .517 |
| | === | === |

## B.2.: BYGNAÐURIN AV SKATTAUMSITINGINI

Ein tilík samanbering eigur tó at takast við fyrivarni. Havast má í huga, at føroysku skattalógirnar eru einfaldiri enn donsku, men hinvegin ger kumulativa skattaskipanin, at fyrispurningarnir til føroyska skattavaldið ivaleyst eru lutfallsliga fleiri enn til danska skattavaldið. Eisini hevur líkningarráðið seinastu tíðina fingið nakrar seruppgávur, sum umsiting av frítíðarpeningi og barnastyrki. Tað, at eindirnar eru so smáar, sum tær eru í Føroyum, má eisini roknast at gera, at effektivitetur verður lægri. Eisini má havast í huga, at ávísar departements- og direktoratsuppgávur kunnu taka líka langa tíð at loysa, um tað búgva 45.000 ella 5.000.000 fólk í landinum.

Fyri ikki at drukna í berari umsiting ella at sita við eini umsiting, ið ikki virkar, er neyðugt at vit laga okkum eftir teimum givnu umstøðunum, at tað einans búgva 45.000 fólk í Føroyum. Hetta skal ikki skiljast soleiðis, at vit t.d. ikki kunnu nýta samtíðarskattaskipanina til onnur endamál, enn hon upprunaliga er ætlað til, men at vit halda okkum eitt sindur aftur við at finna uppá alt ov nógvar uppgávur, og til tær nýggju uppgávurnar, vit fara undir, eiga vit at velja einfaldar og væl grundaðar loysnir.

Líkningarráð Føroya er skipað við einari høvuðsskrivstovu í Tórshavn og 7 deildum úti um landið.

### HØVUÐSSKRIVSTOVAN

Uppgávurnar hjá høvuðsskrivstovuni verða umsitnar av 4 deildum, sum taka sær av hesum uppgávum:

**Roknskapardeild / arbeiðsgevaraeftirlit:**

- vegleiður deildunum í roknskaparlíkning
- átekur sær ta meira fløktu roknskaparálíkningina, herundir grannskoðan av heilum vinnugreinum um alt landið í samráð við líkningarmyndugleikarnar á staðnum
- hevur eftirlit við lønarávísingini um A-skattaskipanina

**Løgfrøðislig deild**

- ger ummæli í landsskattanevndarkærum
- viðger skattamál, ið eru løgd fyri dómsvaldið

&dDB.2.: BYGNAÐURIN AV SKATTAUMSITINGINI

- leggur til rættis og fyrisitur útgávu av lógar- og avgerðasøvnum
- ummælir og tekur lut í útgávuni av øllum kunngerðum, umfarsskrivum og vegleiðingarskrivum ráðsins
- ráðgevur øllum deilum ráðsins í løgfrøðisligum spurningum
- góðkennur allar eftirlønarsáttmálar
- leggur til rættis og tekur lut í øllum dupultskattasáttmálum við onnur lond
- stendur fyri lóggávuarbeiði, sum verður álagt ráðnum
- tekur sær av skrivarastarvinum hjá Líkningarráð Føroya

<u>Edv-deild</u>
Menning:
- Gera nýggjar skipanir og skráir
- víðari útbyggja verandi skipanir
- gera leiðbeiningar
- standa fyri útbugving

Rakstur:
- standa fyri allari framleiðslu
- gera hagtøl
- tekniskt viðlíkahald

Eftirlit:
- standa fyri dagligum eftirliti
- gera avstemmingar
- standa fyri test av øllum koyringum

Umsiting av skráum:
- umsita persónskránna
- Umsita konteringsskránna

<u>Kunningar- og eftirlitsdeild:</u>
- eftirlit við at líkningin er eins um alt landið
- umsita líkningina fyri Suðurstreym uttan Tórshavn
- stendur fyri upplýsing til skattaborgaran
- arkiv - avgreiðsla - innkeyp
- kommunubýti
- deyðsbúgv

## B.2.: BYGNAÐURIN AV SKATTAUMSITINGINI

### DEILDIRNAR UM LANDIÐ

| | |
|---|---|
| Norðoyggjar | - Klaksvík |
| Eysturoy | - Runavík |
| | - Fuglafjørður |
| Norðstreym | - Kollafjørður |
| Vágoy | - Sandavágur |
| Sandur | - Skopum |
| Suðuroy | - Vágur |

Uppgávurnar hjá deildunum eru:

- at fyrireika øll mál í smb. við líkningina til líkningarnevndirnar/bygdarráðini
- at gera uppskot til og avgreiða nevndaravgerðir
- avgreiða líkningarráðssuppgávur mótvegis tí einstaka skattaborgaranum
- saman við høvuðsdeildini verða við til at byggja ein samlíka líkning upp yvir alt landið

DEILDARSKRIVSTOVUR IROKNAD TÓRSHAVNAR LIKNINGARDEILD

| | IBÚGVAR | STØRV | ÍBÚGVAR PR. STARV |
|---|---|---|---|
| NORÐUROYGGJAR | 6.016 | 6 | 1.003 |
| FUGLAFJØRÐUR | 3.929 | 4 (3) | .982 |
| RUNAVÍK | 5.142 | 5 (3) | 1.023 |
| KOLLAFJØRÐUR | 4.805 | 4 (3) | 1.201 |
| VÁGAR | 2.94 | 3 | .981 |
| SUÐURSTREYM | 1.936 | 2 | .955 |
| SANDOY | 1.745 | 2 | .872 |
| SUÐUROY | 5.890 | 6 (4) | .982 |
| TÓRSHAVN | 13.905 | 12.5 + 4 | .843 |
| ALT LANDIÐ | 46.312 | 48,5 | .954 |

## Stutt frágreiðing um skattaumsiting eftir samtíðarskattalógini

1) Tann nýggja lógin.

Løgtingslóg um lands- og kommunuskatt frá 1/9 1983 ber í sær fleiri stórar broytingar til umsitingina.
Fyrst og fremst eru reglurnar um skattainnkrevjing broyttar, men eisini krevur lógin broytingar í bygninginum av skattaumsitingini. Líkningarráðið skal seta á stovn deildir runt landið, uppgávubýtið millum Líkningarráðið og Føroya Gjaldstovu verður broytt, stovning av arbeiðsgevaraeftirliti, samskiftið millum skattavaldið og skattgjaldararnar verður broytt o.s.fr.

Edv-skipanin sum var nýtt síðani 1978, kundi als ikki nýtast til at umsita hesi nýggju krøvini. Henda skipanin var uppbygd soleiðis, at álíkningin var gjørd á edv-skipanini hjá P/F Elektron, meðan bókingar-, útskriving- og innheintingarskipanin varð gjørd á edv-skipan hjá Føroya Gjaldstovu.

Reglurnar um álíkning og innheinting í tí nýggju lógini krevja, at samskiftið millum álíkning og bóking, útskriving, og innheinting má vera nógv tættari enn higartil.

Hetta merkir, at nýggjar skráir skulu gerast, og at tær verandi skráir skulu broytast.

Tær skráirnar sum skuldu gerast fyri at kunna umsita ta nýggju skattalógina vóru:

1) Landsfólkayvirlit
2) Arbeiðsgevarayvirlit
3) Fyribilsskrá
4) Enda-skrá
5) Konteringsskrá
6) Býtisskrá
7) Persónskrá.

Av tí at tær verandi skráirnar skuldu broytast grundleggjandi, var gjørt av heilt at sleppa hesum skráunum, og var tað tí neyðugt eisini at gera eina nýggja skrá til juridiskar persónar.

Umframt omanfyri nevndu skráir, eru fleiri smáar skráir, so sum avstemmingsskrá, kommunuskrá v.m.

Nevnast skal, at skattaumsitingin fevnur um í minsta lagi 5 ár av fyribils- og enda-skráum.

Ein týðandi skipan sum er gjørd, er ein innheintingar- og rykkjaraskipan, sum skattadeildin umsitur. Sjálvt um tann størsti parturin av skattainntøkunum verður afturhildin sum A-skattur, so eru tó nógvir persónar sum skulu gjalda skatt við rokning. Her er talan um B-skatt og írestandi skatt.
Umleið 25% av øllum skattaborgarum hava einhvørja B-inntøku, men tað er bert hjá umleið 10%, at hetta førir við sær, at ein B-skattarokning verður útskrivað.
Hjá hinum 15% verður skatturin av B-inntøkuni uppkravdur saman við skattinum av A-inntøkuni. T.v.s. at tann skatturin, sum verður roknaður og afturhildin í útrokningarskipanini, er skattur av bæði A- og B-inntøkuni.
Harafturat kemur írestandi skattur frá skattauppgerðunum.

Fyribilsskráin, og hjálparskráirnar til hana, nevniliga landsfólkayvirlitið og arbeiðsgevaraskráin, eru gjørdar beinleiðis eftir føroyskum viðurskiftum, og merkir hetta, at arbeiðið við at umsita hesar skráirnar er tann minsti parturin av teimum samlaðu útreiðslunum.
Enda-skráin, og hjálparskráir til hana, nevniliga kontering-persón- og býtisskráin, eru gjørdar eftir skipanini í Danmark, og kemur hetta av, at skattalógin fyri ein stóran part er gjørd út frá tí donsku lógini. Orsøkin til hetta hevur helst verið tíðartrot, og at ikki nóg nógv fólk vóru sett av til eitt gjølla kanningararbeiði.
Tað er tó ikki gjørligt í løtuni at siga, um skattaskipanin kundi havt verið gjørd øðrvísi.

2) Fyribils- og endalig álíkning

Ein skattaskipan, sum hon vit hava í Føroyum, við fyribilsálíkning og -innheinting, og eini endaligari álíkning tá ið árið er av, krevur - alt annað líka - dupult so nógva arbeiðsorku, sum ein skipan við bert eini endaligari álíkning.

Allir persónar, sum skulu setast í skatt í Føroyum, skulu fyribilsskrásetast. Tó er tann fyrimunur í tí føroysku skipanini, at persónar, sum bert hava A-inntøku, ikki skulu skráseta hesa inntøkuna. Reglurnar í skattalógini (broyting frá 8/5 1987) ger tað harafturat gjørligt, um eitt ella tvey ár, at fáa upplýsingar um rentuútreiðslur av lánum í Føroyum, fluttar beinleiðis til skattaskránna, og merkir hetta, at persónar sum bert hava A-inntøku og rentuútreiðslur frá føroyskum peningastovnum, als ikki noyðast at lata inn fyribilsskráseringarskjal.
Harafturat er tað heldur ikki neyðugt at hesir persónar lata inn sjálvuppgávu, men er hetta helst ein løgfrøðisligur spurningur.

Fyri at ímynda sær hvussu stórt arbeiðið við uppbygging av edv- og umsitingarskipanunum hevur verið, kann vísast á, at álíkningin fyri eitt skattaár ikki er liðug fyrr enn 3 ár eftir árslok. T.d. er skattaárið 1984 (inntøkuárið 1984) ikki liðug fyrr enn í oktober 1987. Orsøkin til hetta er, at ein møguligur írestandi skattur minni enn kr. 5.000 skal innroknast í fyribilsskattin árið eftir. Um ein persónur við uppgerð av 1984, sum var gjørd í oktober 1985, fekk írestandi skatt til innrokning komandi skattaár (1986), so kann ikki gerast upp fyrr enn við uppgerðini 1986 (í oktober 1987) um hann hevur goldið so mikið í fyribilsskatti í 1986, at eisini tann innroknaði skatturin frá 1984 er goldin. Um so er, at viðkomandi ikki hevur goldið nóg mikið í fyribilsskatti 1986 til at tann innroknaði skatturin er goldin, so skal serskild rokning sendast viðkomandi til gjalding í januar 1988. Málsviðgerð av skattseting fyri 1984 hjá viðkomandi endar soleiðis í fyrsta lagi við árslok 1987. Hetta tó bert um broytingar til álíkningina ikki eru.

(tølini eru í 1.000).

| Ár | on-line trans. | Linjur | Lønar-trans. | A-inntøka | A-skattur |
|---|---|---|---|---|---|
| 1987 | 3.005 | 24.580 | 1.220 | 3.800 | 1.380 |

Viðmerkingar til talvuna
On-line transaktiónir: Talið vísur hvussu ofta edv-skermarnir verða nýttir til fyrispurningar og broytingar.
Linjur: Talið vísur hvussu nógv verður útskrivað frá skráunum. Umframt listar til dagliga umsiting, er talan um sjálvuppgávur, fyribilsskattaskjøl, kontoavrit til løntakarar og arbeiðsgevarar, skattauppgerð, frítíðarløn, barnastyrk v.m. (sí eisini talvu seinni).

3) Samskifti.

Afturhaldsskipanin, sum er ein "her-og-nú-skipan" ger, at samskiftið millum skattavaldið og skattgjaldararnar er margfaldað í mun til fyrr. Reglurnar um, hvussu nógv skal afturhaldast í skatti av teimum einstøku lønunum, eru ikki so einfaldar hjá nógvum skattgjaldarum, serliga ikki aftaná, at frítíðarlønin eisini verður goldin og skattað saman við A-inntøkuni. Harafturat kann vera talan um ein innroknaðan írestandi skatt, eftirstøðu og útskrivaðan B-skatt. Fólk hava sum heild tí oftari brúk fyri at fáa upplýsing og hjálp frá skattavaldinum.

Í tí gomlu skattaskipanini sendi skattavaldið eina ferð um árið eina sjálvuppgávu og eina ognaruppgerð til allar skattgjaldarar. Tá ið álíkningin varð liðug, vóru send 10 girokort. Hetta var stórt sæð tað skrivliga samskiftið sum skattavaldið hevði við skattgjaldararnar. Her er sjálvandi ikki tikin við málsviðgerð í álíkningini, og broytingar til álíkningina.

Niðanfyri er víst, hvat skattavaldið ídag sendir skattgjaldarunum:

| | |
|---|---|
| Medio í hvørjum mánaði: | Broytingar endaskrá |
| 25. í hvørjum mánaði: | Útgjalding av avlopsskatti |
| Ultimo í hvørjum mánaði: | Broytingar av fyribilsálíkningini |
| | Broytingar av B-skatti |

| | |
|---|---|
| Barnastyrkur 1. ársfjórðing | 10/1 |
| Kontoavrit arbeiðsgevarar | 15/1 |
| Kontoavrit løntakarar | 18/1 |
| Sjálvuppgáva fysiskir persónar | 12/2 |
| Atvinnusjálvuppgávur | 12/2 |
| Sjálvuppgávur juridiskir persónar | 15/3 |
| Barnastyrkur 2. ársfjórðing | 5/4 |
| Frítíðarløn | 5/5 |
| Barnastyrkur 3. ársfjórðing | 4/7 |
| Kontoavrit løntakarar | 7/7 |
| Skattauppgerð | 1/10 |
| Barnastyrkur 4. ársfjórðing | 5/10 |
| Fyribilsskjal | 15/12 |
| B-skattur (høvuðsútskriving) | 15/12 |

Samskiftið millum skattavaldið og aðrar stovnar er munandi broytt síðani 1984. Fyrst og fremst gera reglurnar um A-skatt tað neyðugt, at avrokningarstøðini (peningastovnar og

Postverk Føroya) dagliga hava samband við skattavaldið. Dagliga senda avrokningarstøðini nógvar løntransaktiónir til skattavaldið, har skattaútrokningin fer fram. Síðani fáa avrokningarstøðini boð um, hvussu nógv kann gjaldast løntakaranum.

Sum skipanin hevur verið higartil, hava avrokningarstøðini ikki kunna skrásett persóntalið á kontonumrini, og hava heilt nógvir feilir staðist av hesum. Serliga er tað fráboðanin frá avrokningarstøðunum um, hvørja konto, sum løntakarin skal hava nettolønina setta inn á, sum er skeiv. Tað er tí heilt neyðugt, við einum tættum samstarvi millum skattavaldið og avrokningarstøðini, fyri at fáa feilirnir rættaðar og umbókaðar sum skjótast. Nevnast kann, at í 1987 vóru umleið 8.000 feilir av hesum slagi.
Talið 8.000 feilir er tó ikki meiri enn 0,73% av teimum samlaðu lønarávísingunum, sum í 1987 vóru 1.220.000.

Samskiftið millum skattavaldið og arbeiðsgevararnar er eisini nógv broytt, ikki bert í sambandi við regluliga arbeiðsgevaraeftirlitið, men eisini tá arbeiðsgevarin skal gjalda løn til persónar sum enn ikki eru fyribilsskrásettir.

Á samskiftisøkinum er edv-skipanin bygd til, at kunna lata landsstýrinum, kommununum o.ø. eina tíðarvísa frágreiðing um skattaviðurskiftini í landinum. T.d. kann nevnast at Líkningarráðið er farið undir at senda kommununum eina frágreiðing eina ferð um mánaðin viðvíkjandi skattainntøkum v.m. Higartil hava kommunurnar bert fingið fráboðan frá Føroya Gjaldstovu í sambandi við gjalding av skattainntøkunum.

Deildarskrivstovurnar sum Líkningarráðið hevur sett á stovn, hava ført við sær, at samskiftistørvurin millum starvsfólk innan skattaumsitingina, er broyttur, og størri krøv verða sett til eina virkna samskiftisskipan.

3) Edv - fyrimunur og/ella vansir.

Samtíðarskattaskipanin virkar iki uttan at nýta edv. Skipanin, sum er gjørd til skattaumsitingina, er á einum rættliga høgum støði, sæð í mun til, hvat undirritaðu vita um aðrastaðni. Fyrimunurin við at skráseta persónar á edv, er sjálvsagt tann, at skattaumsitingin verður tvungin til at halda skil á øllum í tí dagliga arbeiðinum. Umsitingin kann ikki "gloyma" ein skattgjaldara, tí allir feilir verða skrivaðir á lista. Harafturat verða ymiskar upplýsingar um skattsetingina skrivaðar á lista, tað kann vera upplýsing um at ein skattgjaldari hevur goldið skatt uttanlanda, ella ein skattgjaldari sum ikki kann nýta rentufrádráttin o.s.fr. Alt hetta ger, at umsitingin alla tíðina veit hvat gongur fyri seg í teimum ymisku skráunum, og alla tíðina syrgir fyri at allir persónar eru rætt skrásettir.

Tann nýggja edv-skipanin gevur nógvar møguleikar fyri at gera hagtøl, og tað serliga við tí føroysku fyribilsskattaskipanini er, at hagtølini frá henni kunnu vera "dags-aktuell" viðvíkjandi A-inntøkum í landinum. Tey ymisku hagtølini frá skattaskráunum kunnu nýtast sum eitt gott stýringsamboð, bæði hjá skattaumsitingini og hjá teimum sum skulu taka ymiskar samfelagsligar avgerðir. Fyri at fáa mest møguligt burturúr hagtølunum, er tað sjálvsagt neyðugt at gera edv-skipanina soleiðis, at hon er før fyri at kunnu lata hagtølini á slíkan hátt, at brúkarin av teimum, er vælnøgdur. Hetta krevur eina vælvirkandi edv-skipan, og at upplýsingarnar verða goymdar soleiðis, at eisini søgulig hagtøl kunnu gerast.

Afturhaldskipanin til fyribilsskatt verður eisini nýtt til annað enn skattainnkrevjing. Frá og við apríl 1986, verður frítíðarlønin goldin og skattað saman við A-inntøkuni. Tann eftirhildna frítíðarlønin verður í mei mánað goldin løntakaranum, og er tað Líkningarráðið sum stendur fyri hesum. Frá og við oktober 1987 umsitur Líkningarráðið lógina um barnastyrk. Barnastyrkurin verður goldin 4 ferðir um árið.

Umsitingin av samtíðarskattaskipanini hevur gjørt tað neyðugt, at hvør persónur í umsitingini má hava ein edv-skerm. Í 1981 var 1 edv-skermur á Líkningarráðnum. Alt líkningararbeiðið var gjørt manuelt við skriving av broytingarskjølum, sum skulu sendast Skattadeildini á Føroya Gjaldstovu. Løgtingslóg um lands- og kommunuskatt áleggur Líkningarráðnum at umsita allir skattaskráir, og er í hesum sambandi gjørd ein reglugerð um arbeiðsbýtið millum Líkningarráðið og Føroya Gjaldstovu. Í tí nýggju skipanini er pappírsgoymslan gjørd nógv minni, og mest møguligt av arbeiðinum er lagt inn á edv. Hetta ger tað neyðugt, at øll starvsfólk hava ein edv-skerm sum sítt dagliga arbeiðsamboð.

í nevndu reglugerð um arbeiðsbýtið, er álagt Líkningarráðnum at kunna avgreiða allar fyrispurningar frá skattgjaldarunum, og krevur hetta, at edv-skipanin er uppbygd soleiðis, at persónar á Líkningarráðnum og deildarskrivstovunum skjótt kunnu leita tær neyðugu upplýsingarnar fram.

Fyrimunurin við at øll starvsfólk hava ein edv-skerm, sæst m.a. av, at gjørligt er at hava eina felags tekstviðgerð-skipan, sum umframt til vanliga nýtslu av tekstviðgerð, eisini kann nýtast sum samskiftistól millum tær ymisku deildarskrivstovurnar.
Harafturat hevur Líkningarráðið stovnað eitt lógarsavn, har allar lógir, kunngerðir, rundskriv v.m. viðvíkjandi skatti er løgd inn. Lógarsavnið er tøkt hjá øllum sum hava ein edv-skerm við on-line atgongd til P/F Elektron.*

Eisini kann nevnast, at Líkningarráðið hevur on-line atgongd til CPR (Det centrale personregister) í Danmark. Rættliga nógv arbeiði hevur verið av at umsita bústaðarupplýsingar hjá persónum sum eru fluttir av landinum, og hevur on-line sambandið til CPR gjørt hetta arbeiðið nógv lættari og bíligari.

---

*Lógarsavnið kann keypast í bókhandlunum frá og við 1/7 1988.

## D.1.: ARBEIÐIÐ HIGARTIL

*Tíðarskeiðið 1982-1984:*

Arbeiðið við samtíðarskattinum byrjaði í 1982. Fyrst og fremst varð tað lógararbeiðið, sum skuldi gerast, og arbeiðið við planlegging og programmering av edv-skipanini, kom tískil ikki í gongd av álvara fyrr enn á heystið 1983.

Skipanin, sum hon tá varð gjørd, varð uppbygd við trimum skráum:



## D.1.: ARBEIÐIÐ HIGARTIL

*Tíðarskeiðið 1982-1984:*

Skráirnar hava fylgjandi uppgávur:

LFY-SKRÁIN: Landsfólkayvirlitið er høvuðs- og grundarlagsskráin við øllum persónum, sum hava verið búsettir ella hava havt uppihald í Føroyum síðani 1. juli 1982.

Umframt at virka sum manntalsgrundarlag fyri skattaskránna, skal landsfólkayvirlitið umsita allar vanligar manntalsuppgavur viðv. til- og fráflyting, broyting í borgarastøðu (gift,skilnað,deyð v.m.), vallistar, manntalshagtøl, og aðrar upplýsingar av almennum slag.

AGY-SKRÁIN: Arbeiðsgevaraskráin inniheldur allar arbeiðsgevarar, og er hon samstundis grundarlagsskrá fyri alla juridiskar persónar. Skráin er grundarlagið undir eftirlitinum hjá Líkningarráðnum, við at lógarásetingin um ávísing yvir eftirhaldsskipanina verður hildin.

FYRIBILS-SKRÁIN: Fyribilsskattaskráin inniheldur allar persónar, sum við ársbyrjan verða mettir at vera skattskyldugir í avvarðandi skattaári. Skráin verður hvønn dag dagførd við tilgongd frá LFY.

Fyribilsskráin skal røkja fleiri ymsar uppgávur, m.a. skráseting av fyribilsinntøkum og -frádráttum, útrokning og eftirhalding av A-skatti, útrokning og bóking av B-skatti, býti millum land og kommunur av goldnum fyribilsskatti v.m.

Tá hetta arbeiðið varð liðugt, fór samtíðarskattaskipanin í gongd við innkrevjing av A- og B-skatti.

## D.1: ARBEIÐIÐ HIGARTIL

*Tíðarskeiðið 1984-1986:*

Samtíðarskattaskipanin fór í gongd 1. apríl 1984 við innkrevjing av fyribilsskatti, men sum navnið sjálvt sigur frá, varð hetta bert ein 'fyribilsskipan', sum byggir á eitt met um inntøkur og frádráttir í 'fyribilsárinum'.
Tá árið er av, skal gerðast upp endaliga, og tann 'endaligi' skatturin skal samanberast við 'fyribils'-skattin.

Tann endaliga skipanin kom at umfata 4 nýggjar skráir, sum hvør hevur sína serstaka uppgávu.

LFY : LANDSFÓLKAYVIRLIT

AGY : ARBEIDSGEVARASKRÁ

FYRI : FYRIBILSSKATTASKRÁ

PERS : PERSÓNSSKIPAN

ENDA : ÁLÍKNINGARSKRÁ

KONT : KONTERINGSSKRÁ

BÝTI : BÝTISSKÁ




Tær flestu skráirnar eru ikki ársbundnar, men bæði fyribilsskráin og tann endaliga skráin eru ársskráir, t.v.s. at tað verður stovnað ein nýggj skrá á hvørjum ári við nýggjum manntalsgrundarlagi.

Hjá Líkningarráðnum er hetta ein smidlig skipan, sum ger tað lættari at gera broytingar millum árini, t.d. í samsvar við nýggjar lógarásetingar. Hjá Skattadeildini, sum hevur ábyrgdina av innkrevjingini, er tað óarbeiðsligt og fløkjasligt at hava so nógvar sjálvstøðugar skráir, og vóru konteringsupplýsingarnir tí lagdir saman í eina ikki ársbundna skrá.

## D.1: ARBEIÐIÐ HIGARTIL

*Tíðarskeiðið 1984-1986:*

Tær 'endaligu' skráirnar eru hesar:

PERSÓNS-SKRÁIN: Umframt manntalsupplýsingarnar úr LFY inniheldur persónsskráin ymsar grundarlagsupplýsigar av skattligum týdningi, so sum upplýsingar um fyrrverandi borgarastøður, uttanlanda adressur, kontonummar til avlopsskatt v.m.

ENDALIGA-SKRÁIN: Skráin inniheldur álíkningina fyri avvarðandi ár. Har eru upplýsingar frá sjálvuppgávuni og høvuðsálíkningini, umframt allar seinni hækkingar og lækkingar. Meðan fyribilsskráin bara verður nýtt í umleið eitt ár, so skal tann endaliga skráin nýtast í nógv ár framyvir.

KONTERINGS-SKRÁIN: Skráin varð stovnað, tá tann endaliga skipanin fyri 1984 varð gjørd, og er hon síðani útbygd líðandi, soleiðis at hon frá og við 1988 inniheldur øll krøv og øll gjøld fyri øll skattasløg og øll skattaár.

Skipanin umfatar m.a. bókingar- og innkrevjingarskipanir, renturokning og útgjaldsskipan til avlopsskatt og barnastyrk v.m. fyri tann einstaka skattgjaldaran.

Býtis-skráin: Skráin er gjørd sum ein ikki ársbundin skrá, sum inniheldur øll skattaár.

Umframt býti og avrokning av goldnum skatti, umfatar skipanin eisini møguleikar til broyting av kommunuanpørtum, og til striking og eftirgeving av skatti.

## D.1: ARBEIÐIÐ HIGARTIL

*Tíðarskeiðið 1986-1988:*

Í 1986, tvey ár aftaná byrjanina, vóru skattaskráirnar vaksnar til 10, t.v.s. at umframt tær ikki ársbundnu skráirnar vóru 3 fyribilsskráir og 2 endaligar skráir.
Enn restaði ymiskt í, bæði í býtisskipanini og í konteringsskipanini.

Lógin um frítíðarløn varð viðtikin hetta várið, og mátti henda uppgávan takast fram um alt annað.
Innkrevjingin varð tengd uppí A-skattaskipanina fyri 1986, men meðan fyribilsskipanin fylgir kalendaraárinum, so koyrir frítíðarlønarskipanin við forskotnum ári.
Tann frítíðarløn, sum kom til útgjaldingar tann 1. maj 1987, varð sostatt skrásett í bæði 1986- og 1987-árinum. Hetta gjørdi skipanina tunga og tvørliga at arbeiða við, og varð tí eitt gamalt ynski hjá Líkningarráðnum, um at fáa samlað allar útgoldnar lønir í eina ikki ársbundna skrá, tikið fram aftur.

LFY : LANDSFÓLKAYVIRLIT
AGY : ARBEIDSGEVARASKRÁ
FYRI : FYRIBILSSKATTASKRÁ
PERS : PERSÓNSSKIPAN
ENDA : ÁLÍKNINGARSKRÁ
KONT : KONTERINGSSKRÁ
BÝTI : BÝTISSKÁ
LNAR : LØNARSKRÁ
JURS : JURIDISK SKIPAN




Hesin tørvur hevði upprunaliga samband við, at fleiri arbeiðsgevarar hava forskotið roknskaparár, og arbeiðsgevaraeftirlitið hevur tí brúk fyri at kunna taka fram eitthvørt tíðarskeið, eisini tvørturum eitt ársskifti.
Harumframt varð fyribilsskráin tvørlig at arbeiða við hjá arbeiðsgevaraeftirlitinum, av tí at hon varð skipað eftir persónstali, og ikki eftir arbeiðsgevaratali.

## D.1: ARBEIÐIÐ HIGARTIL

*Tíðarskeiðið 1986-1988:*

Skipaninar, sum komu aftrat í hesum tíðarskeiðnum, eru hesar:

Lønar-skráin: Lønar-skráin varð gjørd í 1987, og er hon nógv tann rúgvismiklasta av skattaskráunum. Í løtuni eru í henni allar útgoldnar lønir frá 01. april 1984 og til dagsdato.

Skipanin til útskriving av kontoavritum til arbeiðsgevara er flutt yvir í hesa skrá, og í løtuni verður arbeitt við at leggja útgjaldsskipanina fyri frítíðarløn og útskrivingina av kontoavriti til løntakara yvir higar.

Juridiska-skráin: Tá samtíðarskatturin varð komin í gongd, lógu feløgini einsamøll eftir í tí gomlu skipanini. Fyri at sleppa undan at halda viðlíka tvey ymisk edv-kervi, varð avgjørt eisini at leggja partafelagsálíkningina inn í nýggju edv-skipanina.
Arbeiðið við tí juridisku skipanini varð byrjað í 1986/87. Ætlanin er at skipanin skal fevna um teir somu møguleikarnar, sum enda-, konterings- og býtisskipaninar hava fyri persónsálíkningina. Partar av skipanini eru lidnir, og tað verður í løtuni arbeitt við at fullfíggja hana.

Barnastyrkurin: Lógin um barnastyrk varð viðtikin í 1987. Eins og við frítíðarlønini skuldi ein edv-skipan fáast upp at standa sum skjótast, og tann fyrsta útgjaldingin var klár til avgreiðslu í desember mánaða hetta árið.

Skipanin viðv. barnastyrki er ikki bygd upp við eini egnari skrá, men er ístaðin bygd sum ein integrerað skipan millum LFY-, fyribils- og konteringsskránna, á sama hátt sum frítíðarlønarskipanin er ein integrerað skipan millum fyribils-, lønar- og konteringsskránna.

## D.2.: SAMTÍÐARSKATTASKIPANIN Í DAG

Samtíðarskattaskipanin er vaksin so líðandi, og í dag kunnu arbeiðsuppgávurnar býtast í hesar 12 høvuðsbólkar:

### HØVUDSYVIRLIT YVIR SAMTÍDARSKATTIN

FYRIBILSSKIPANIN
1. MANNTAL
2. KOMMUNIKATION
3. ON-LINE
4. B-SKATTUR
5. A-SKATTUR
6. FYRIBILSBYTI

LØNARSKIPAN
1. KOMMUNIKATION
2. ON-LINE
3. KONTOAVRIT
4. FRÍTÍDARLØN

BYTISSKIPAN
1. MANNTAL
2. KOMMUNIKATIÓN
3. ON-LINE
4. BÝTI
5. AVROKNING

BARNASTYRKUR
1. ON-LINE
2. ÚTROKNING
3. ÚTGJALDING

LANDSFOLKAYVIRLITID
1. ON-LINE
2. MANNTALSLISTAR
3. HAGTØL

LÓGARSAVN
1. ON-LINE
2. DIAL-UP
3. PRENT-ÚTTREKK
4. PC-ÚTTREKK

EKDASKIPANIN
1. MANNTAL
2. KOMMUNIKATIÓN
3. ON-LINE
4. ÁVARD.SKIPAN
5. ÚTROKNING
6. UPPGERD
7. ÚTSKRIVING

KONTERINGSSKIPAN
1. KOMMUNIKATION
2. ON-LINE
3. RENTUROKNING
4. AVLOPSSKATTUR
5. RYKKJARASKIPAN

PARTAFELAGSSKIPAN
1. MANNTAL
2. ON-LINE
3. HØVUDSKOYRING
4. MÁNADARKOYRING
5. RENTUROKNING
6. RYKKJARASKIPAN

PERSÓNSSKIPANIN
1. KOMMUNIKATIÓN
2. ON-LINE
3. ÁVARD.SKIPAN

ARBEIDSGEVARAYVIRLITID
1. ON-LINE
2. HAGTØL

YMISKT
1. TRYGDARSKIPAN
2. STANDARDSKIPANIR
3. HAGTØL
4. SIMULERING

D.2.: SAMTÍÐARSKATTASKIPANIN Í DAG

Tað er ymiskt, hvussu nógv arbeiði er av at halda viðlíka tær ymisku skipaninar. Summar koyra at kalla órørdar ár undan ári, meðan aðrar eru í støðugari broyting.
So hvørt sum skipanin er vaksin, eru tað fleiri og fleiri upplýsingar sum ferðast í millum skráirnar, og viðlíkahaldið er meiri umfatandi.

Tørvurin av hagtalstilfari sum hjálparamboð hjá teimum politisku myndugleikunum til planlegging og stýring av samfelagsviðurskiftunum setur í dag vaksandi krøvi til edv-skipanina og til liðiligar og brúkaravinarligar skipanir til hagtals- og granskingarendamál.

Tá høvuðsskipaninar vóru gjørdar, vóru tilsamans 19 fólk á Elektron heilt ella lutvíst við í edv-arbeiðnum fyri samtíðarskattin.
Í dag er talið 9, samstundis sum talið av skráum er vaksið úr upprunaliga 3 til í dag 16 skráir, harav 4 enda-skráir og 5 fyribils-skráir, umframt ymiskar hjálparskráir, so sum kommunuskrá, frítíðarfelagsskrá v.m.

## D.3.: PLANLEGGING OG RAKSTUR

*Tímaætlan*

Fyri at hava eftirlit við og stýring á teimum uppgávum, sum eru í gerð, og sum skulu gerast til ávís tíðarskeið, er neyðugt hvønn mánaða at hava eitt greitt yvirlit yvir, hvussu tíðarkrevjandi tær einstaku uppgávurnar kunnu metast at vera, og eftir hesum at leggja eina samlaða tíðarætlan fyri teir komandi 12 mánaðirnar.

Fyri at hava stýring á hesum, verður hvønn mánaða gjørd eina tímaætlan, sum inniheldur upplýsingar um, hvussu tíðarkrevjandi hvør uppgáva verður mett at vera, og hvussu nógvir arbeiðstímar, sum eru nýttir til ta einstøku uppgávuna.

Tað samlaða metta tímatalið fyri tær kendu uppgávurnar verður sett upp ímóti tí tøka tímatalinum,. og við verandi uppgávum og verandi manning kann ongin nýggj uppgáva verða sett á tímaætlaninia, uttan so at ein onnur verður tikin av.

*Rakstrarætlan*

Umframt tær føstu dagligu uppgávurnar eru nógvar stórar rakstraruppgávur, sum skulu gerast til ávísar tíðir.
Hesar upgávur skulu leggjast til rættis í góðari tíð, og alt tað neyðuga tilfarið skal vera tøkt í rættari tíð og mongd.

Rakstrarætlanin verður gjørd saman við Líkningarráðnum, og umfatar hon teir 12 mánaðar.
Rakstrarætlanin inniheldur ikki tær dagligu koyringarnar, bara tær regluligu afturvendandi mánaðar-, kvartals- og árskoyringarnar.

## D.4.: PLANLEGGING OG RAKSTUR

Niðanfyri sæst eitt avrit av rakstrarætlanini fyri juli mánað 1988.

RAKSTRARÆTLAN

1988

viðvíkjandi: Mánaðar-, kvartals-, hálvárs- og árskoyringum

| SKIPAN | mánaði: JULI<br>vika: 26 | 27 | 28 | 29 | 30 |
|---|---|---|---|---|---|
| Fyribilsbyt. 88 | Fríggjadag | | | | |
| Barnastyrkur 88 | | Mánadag | | | |
| Eftirlitsskipan 88 | | | | | Mikudag |
| Ymiskir hagtalslistar | | | | Mánadag | |
| Ende - byti 83 | | | | Mánadag | |
| Ende - byti 84 | | | | Mánadag | |
| Ende - byti 85 | | | Fríggjadag | | |
| Ende - byti 86 | | | Hósdag | | |
| Meirskattur 83 | | Fríggjadag | | | |
| Ársuppgerð 84 (maxi) | | | Mánadag | | |
| Ársuppgerð 85 (maxi) | | Fríggjadag | | | |
| Ársuppgerð 86 (maxi) | | Fríggjadag | | | |
| Ársuppgerð 84 (mini) | | Týsdag | | | |
| Ársuppgerð 85 (mini) | | Mánadag | | | |
| Ársuppgerð 86 (mini) | Fríggjadag | | | | |
| Ársuppgerð 87 (mini) | Fríggjadag | | | | |
| Kontoavrit (lønmótt.) | | Hósdag | | | |
| Rykkjaraskipan | | | Mikudag | | |
| B-skattur (mánaðarkoyring) | | | | Hósdag | |
| Partafelagsálikning | | | Hósdag | | |
| – | | | | | |
| | | | | | |
| | | | | | |
| | | | | | |
| | | | | | |

D.4.: ARBEIÐIÐ FRAMYVIR

Samtíðarskattaskipanin er í dag ein tíðarhóskandi skipan, á rættiliga høgum teknologiskum grundarlagi.

Samfelagsviðurskiftini eru í støðugari broyting, og nýggj ynskir og krøv verða støðugt sett fram frá øllum síðum.

Nýggjar lógir og uppskot um broytingar verða løgd fram, og tørvurin á hagtalstilfari í hesum samband er nógv vaksandi.

Eisini tað tekniska grundalagið er í støðugari broyting, og tað sum var tvørligt í gjár, er ein sjálvfylgja í dag.

Ein edv-skipan er tí ongantíð 'liðug'. Hon er er eitt amboð, sum altíð skal lagast til umhvørvi, sum skal útbyggjast og effektiviserast, og sum skal tæna tí tørvi, sum er tilstaðar til eina og hvørja tíð.

Arbeiðið við at menna skipanina eigur tí ongantíð steðga. Umframt at hava regluligt eftirlit og viðlíkahald av skipanini, er neyðugt alla tíðina at endurskoða innihald, funktiónir og bygnaðin av skipanini, fyri at halda eitt tíðarhóskandi teknologiskt støði, og fyri at laga skipanina til tey krøv, sum nýggjar tíðar og skiftandi tørvur seta til hana.

## Fyribilsskattur ( í 1.000 kr )

| | 1984 | 1985 | 1986 | 1987 |
|---|---|---|---|---|
| A skattur | 745.628 | 1.096.640 | 1.271.469 | 1.380.673 |
| B skat.líkn. | 82.146 | 115.680 | 117.426 | 124.076 |
| § 76 inngj | 28.111 | 9.353 | 13.487 | 1.508 |
| § 75 útgj. | -22.770 | -10.844 | -7.182 | -3.117 |
| íalt | 833.115 | 1.210.829 | 1.395.200 | 1.503.140 |

**Eftirstøða í kr av B-skatti:**

| | 1984 | 1985 | 1986 | 1987 |
|---|---|---|---|---|
| við høvuðsálíkning | 4.784 | 13.120 | 11.793 | 17.546 |
| pr. dags dato | 889 | 3.636 | 7.161 | 17.546 |

**Eftirstøða pr. dags dato í %**

| | 1984 | 1985 | 1986 | 1987 |
|---|---|---|---|---|
| av fyribilsskatti íalt | 0,1% | 0,3% | 0,5% | 1,2% |
| av líknaðum B-skatti | 1,1% | 3,1% | 6,1% | 14,1% |

# Fyribilsskattur

## 1.000 kr



# FYRIBILSSKATTUR



Endaligur skattur vm ( í 1.000 kr )

| | 1984 | 1985 | 1986 |
|---|---|---|---|
| Landsskattur | 485.591 | 733.981 | 858.855 |
| Kommunuskattur | 301.380 | 450.920 | 510.632 |
| Kirkjuskattur | 4.051 | 6.105 | 7.542 |
| Atvinnuskattur | 702 | 1.047 | 1.025 |
| Íalt | 791.724 | 1.192.053 | 1.378.054 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Avlopsskattur | 97.063 | 83.157 | 93.814 |
| Írestandi skattur | 56.777 | 69.831 | 94.231 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Avlopsskattur í % av endal.sk | 12,25% | 6,97% | 6,80% |
| Írestandi skattur í % av endal.sk | 7,17% | 5,85% | 6,80% |

# ENDALIGUR SKATTUR

## 1.000 KRÓNUR



# AVLOPS-/ÍRESTANDI SKATTUR



LÍKNINGARRAÐ FØROYA. TÓRSHAVN TANN: 11.4.1988 

SKATTAALÍKNING HØVUÐSTØL (Í 1000 KR.) (ENBATH02)

| INNTØKUBÓLKAR | | 1984 | 1985 | 1986 | 1987 | 1988 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| - | 0 | -4.529 | -8.224 | -13.348 | 0 | 0 |
| 0 - | 10.000 | 18.848 | 19.510 | 18.502 | 0 | 0 |
| 10.000 - | 20.000 | 39.950 | 53.518 | 36.676 | 0 | 0 |
| 20.000 - | 30.000 | 70.595 | 73.732 | 73.475 | 0 | 0 |
| 30.000 - | 40.000 | 104.154 | 75.937 | 108.242 | 0 | 0 |
| 40.000 - | 50.000 | 76.638 | 75.937 | 69.556 | 0 | 0 |
| 50.000 - | 60.000 | 82.960 | 83.155 | 88.202 | 0 | 0 |
| 60.000 - | 70.000 | 98.436 | 92.310 | 94.449 | 0 | 0 |
| 70.000 - | 80.000 | 105.582 | 109.323 | 108.549 | 0 | 0 |
| 80.000 - | 90.000 | 111.641 | 113.207 | 115.432 | 0 | 0 |
| 90.000 - | 100.000 | 115.132 | 120.522 | 110.961 | 0 | 0 |
| 100.000 - | 110.000 | 277.412 | 257.000 | 245.721 | 0 | 0 |
| 120.000 - | 140.000 | 312.751 | 313.463 | 307.327 | 0 | 0 |
| 140.000 - | 160.000 | 335.310 | 345.873 | 338.612 | 0 | 0 |
| 160.000 - | 180.000 | 271.115 | 308.153 | 339.470 | 0 | 0 |
| 180.000 - | 200.000 | 232.246 | 285.331 | 313.690 | 0 | 0 |
| 200.000 - | 220.000 | 181.429 | 243.892 | 290.302 | 0 | 0 |
| 220.000 - | 240.000 | 132.662 | 178.347 | 231.327 | 0 | 0 |
| 240.000 - | 260.000 | 101.482 | 142.804 | 190.708 | 0 | 0 |
| 260.000 - | 280.000 | 77.278 | 104.762 | 139.697 | 0 | 0 |
| 280.000 - | 300.000 | 57.496 | 80.277 | 115.543 | 0 | 0 |
| 300.000 - | 350.000 | 94.639 | 130.247 | 191.497 | 0 | 0 |
| 350.000 - | 400.000 | 66.430 | 76.462 | 123.626 | 0 | 0 |
| 400.000 - | 450.000 | 37.323 | 57.565 | 70.447 | 0 | 0 |
| 450.000 - | 500.000 | 23.686 | 32.749 | 42.529 | 0 | 0 |
| 500.000 - | 600.000 | 43.438 | 39.620 | 56.775 | 0 | 0 |
| 600.000 - | 700.000 | 22.444 | 20.833 | 38.382 | 0 | 0 |
| 700.000 - | 800.000 | 23.030 | 6.044 | 20.130 | 0 | 0 |
| 800.000 - | 900.000 | 6.836 | 9.284 | 15.144 | 0 | 0 |
| 900.000 - | 1.000.000 | 8.683 | 5.394 | 4.807 | 0 | 0 |
| 1.000.000 - | 1.500.000 | 23.190 | 16.508 | 13.579 | 0 | 0 |
| 1.500.000 - | | 44.494 | 3.606 | 11.323 | 0 | 0 |
| | | 3.192.768 | 3.453.141 | 3.911.332 | 0.000.000 | 0.000.000 |

LÍKNINGARRÁÐ FØROYA, TÓRSHAVN TANN: 08.04.1988 (ENBATH05)

SKATTAÁLÍKNING HØVUDSTØL TAL AV SKATTABORGARUM FYRI LANDIÐ

PERSÓNBÓLKAR

| | | 17.03.1988 1984 | 17.03.1988 1985 | 17.03.1988 1986 |
|---|---|---|---|---|
| SKATTAKODA | 021 | 37066 | 38218 | 38481 |
| | 022 | 257 | 206 | 188 |
| | 023 | 93 | 86 | 102 |
| | 123 | 646 | 629 | 924 |
| | 223 | 558 | 974 | 833 |
| | BLANK | 0 | 0 | 0 |
| | ANNAÐ | 0 | 0 | 0 |
| | | 38620 | 40113 | 40528 |
| PERSÓNSKODA | 00 | 1297 | 1689 | 1859 |
| | 01 | 12276 | 12758 | 13122 |
| | 02 | 3421 | 3999 | 3853 |
| | 03 | 2977 | 2985 | 2990 |
| | 04 | 15622 | 15503 | 15577 |
| | 05 | 2885 | 3020 | 3062 |
| | 07 | 60 | 68 | 32 |
| | 08 | 56 | 57 | 32 |
| | 09 | 26 | 34 | 1 |
| | ANNAÐ | 0 | 0 | 0 |
| | | 38620 | 40113 | 40528 |

KODUFRÁGREIÐINGAR:

021 : FULL SKATTASKYLDA
022 : SJÓMANSSKATTASKYLDA
023 : AVM. SKATTASK. FYRI ÚTLENDINGAR VIÐ B_INNTØKU
123 : AVM. SKATTASK. FYRI HERBÚGVANDI (TILFLYTARAR)
223 : AVM. SKATTASK. FYRI ÚTLENDINGAR UTTAN B_INNTØKU (FYRIBILS UPPIHALD)

00 : EINGIN PERSÓNSFRÁDRÁTTUR
01 : ÓGIFT ELLA GIFT, MEN IKKI SAMSKATTAÐI
02 : YNGRI ENN 16 ÁR
03 : IKKI SAMSKATTAÐUR PENSIONISTUR
04 : SAMSKATTAÐUR, MEN IKKI PENSIONISTUR
05 : SAMSKATTAÐUR PENSIONISTUR
07 : P.13 BÚGV: DEYÐUR MANNLIGUR PENSIONISTUR
08 : P.13 BÚGV: EFTIRLIVANDI KVINNULIGUR PESNSIONISTUR
09 : P.13 BÚGV: EFTIRLIVANDI KVINNA

LÍKNINGARRÁÐ FØROYA, TÓRSHAVN TANN: 08.04.1988 (ENBATH06)

SKATTAÁLÍKNING HØVUDSTØL (Í 1.000 KR) FYRI LANDIÐ - ÁLÍKNAÐUR SKATTUR

PERSÓNBÓLKAR

| | | 17.03.1988<br>1984 | 17.03.1988<br>1985 | 17.03.1988<br>1986 |
|---|---|---|---|---|
| SKATTAKODA | 021 | 782.935 | 1.179.279 | 1.361.980 |
| | 022 | 1.527 | 1.914 | 2.846 |
| | 023 | 694 | 924 | 1.537 |
| | 123 | 2.133 | 2.757 | 6.281 |
| | 223 | 4.423 | 7.169 | 5.401 |
| | BLANK | 0 | 0 | 0 |
| | ANNAÐ | 0 | 0 | 0 |
| | | 791.712 | 1.192.043 | 1.378.045 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| PERSÓNSKODA | 00 | 7.249 | 10.850 | 13.219 |
| | 01 | 267.019 | 426.615 | 511.743 |
| | 02 | 883 | 1.149 | 2.098 |
| | 03 | 16.185 | 26.045 | 29.047 |
| | 04 | 467.053 | 677.420 | 767.330 |
| | 05 | 32.722 | 48.947 | 54.229 |
| | 07 | 601 | 1.017 | 378 |
| | 08 | 0 | 0 | 0 |
| | 09 | 0 | 0 | 0 |
| | ANNAÐ | 0 | 0 | 0 |
| | | 791.712 | 1.192.043 | 1.378.044 |

KODUFRÁGREIÐINGAR:

021 : FULL SKATTASKYLDA
022 : SJÓMANSSKATTASKYLDA
023 : AVM. SKATTASK. FYRI ÚTLENDINGAR VIÐ B_INNTØKU
123 : AVM. SKATTASK. FYRI HERBÚGVANDI (TILFLYTARAR)
223 : AVM. SKATTASK. FYRI ÚTLENDINGAR UTTAN B_INNTØKU (FYRIBILS UPPIHALD)

00 : EINGIN PERSÓNSFRÁDRÁTTUR
01 : ÓGIFT ELLA GIFT, MEN IKKI SAMSKATTAÐI
02 : YNGRI ENN 16 ÁR
03 : IKKI SAMSKATTAÐUR PENSIONISTUR
04 : SAMSKATTAÐUR, MEN IKKI PENSIONISTUR
05 : SAMSKATTAÐUR PENSIONISTUR
07 : P.13 BÚGV: DEYÐUR MANNLIGUR PENSIONISTUR
08 : P.13 BÚGV: EFTIRLIVANDI KVINNULIGUR PESNSIONISTUR
09 : P.13 BÚGV: EFTIRLIVANDI KVINNA


SKATTSKYLDUG INNTØKA
HØVUÐSTØL
1984
1985
1986
0
100
200
300
400
500
600
700
800
900
1000
INNTØKUBÓLKAR – 1.000 kr

SALDOLISTI KONTERING PR. FORF.ÁR (1000 KR.) (KOBATH01)

| | GOMUL ÁR | 1983 | 1984 | 1985 | 1986 | 1987 | ÍALT |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **ÚTSKRIVAÐUR SKATTUR** | | | | | | | |
| A | 0 | 0 | 750.849 | 1094.261 | 1277.784 | 1380.794 | 4.503.688 |
| B | 0 | 0 | 82.146 | 115.681 | 117.427 | 124.076 | 439.330 |
| M1983 | 0 | 0 | 1.371 | 0 | 14.490 | 563 | 16.424 |
| R1984 | 0 | 0 | 0 | 0 | 62.078 | 3.522 | 65.600 |
| R1985 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 74.296 | 74.296 |
| R1986 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| O1983 | 0 | 0 | 0 | 0 | 796- | 1.887- | 2.683- |
| O1984 | 0 | 0 | 0 | 94.883- | 17.496- | 3.714- | 116.093- |
| O1985 | 0 | 0 | 0 | 0 | 83.935- | 12.215- | 96.150- |
| O1986 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 94.432- | 94.432- |
| ÍALT: | 0 | 0 | 834.366 | 1115.059 | 1369.552 | 1471.003 | 4.789.980 |
| **GOLDIN SKATTUR** | | | | | | | |
| A | 0 | 0 | 750.849 | 1094.261 | 1277.784 | 1380.794 | 4.503.688 |
| B | 0 | 0 | 81.249 | 112.062 | 110.305 | 107.071 | 410.687 |
| M1983 | 0 | 0 | 1.303 | 0 | 13.398 | 414 | 15.115 |
| R1984 | 0 | 0 | 0 | 0 | 55.523 | 2.664 | 58.187 |
| R1985 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 60.046 | 60.046 |
| R1986 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| O1983 | 0 | 0 | 0 | 0 | 796- | 1.887- | 2.683- |
| O1984 | 0 | 0 | 0 | 94.858- | 17.480- | 3.713- | 116.051- |
| O1985 | 0 | 0 | 0 | 0 | 83.917- | 12.215- | 96.132- |
| O1986 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 94.425- | 94.425- |
| ÍALT: | 0 | 0 | 833.401 | 1111.465 | 1354.817 | 1438.749 | 4.738.432 |
| **SALDO** | | | | | | | |
| A | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| B | 0 | 0 | 897 | 3.619 | 7.122 | 17.005 | 28.643 |
| M1983 | 0 | 0 | 68 | 0 | 1.092 | 149 | 1.309 |
| R1984 | 0 | 0 | 0 | 0 | 6.555 | 858 | 7.413 |
| R1985 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 14.250 | 14.250 |
| R1986 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| O1983 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| O1984 | 0 | 0 | 0 | 25- | 16- | 1- | 42- |
| O1985 | 0 | 0 | 0 | 0 | 18- | 0 | 18- |
| O1986 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 7- | 7- |
| ÍALT: | 0 | 0 | 965 | 3.594 | 14.735 | 32.254 | 51.548 |
| Í PCT: | 0,00 | 0,00 | 0,12 | 0,32 | 1,08 | 2,19 | 1,08 |

# FYRIBILSSKATTUR

